# ETUR FØROYA








Føroya Læraraskúli:

## Læraraútbúgvingin

Læraraútbúgvingin tekur 4 ár og er í tveimum stigum.
Fyrri partur er 3 ára útbúgving á bachelorstøði. Dentur verður lagdur á, at tey lesandi fáa eitt gott fakligt grundarlag í lærarayrkinum, t.d. at skilja grundleggjandi tættir í ástøðiligum arbeiðisháttum, læra virðini, lærarayrkið byggir á, nema sær ta frálæruligu, námsfrøðiligu og sálarfrøðiligu vitan og teir førleikar, lærarin hevur brúk fyri og savna hugan um ta breiðu fakligu vitanina, ið krevst at undirvísa í annaðhvørt hug- ella náttúrvísindaligu lærugreinunum
Triðja árið verður fyrra linjan lisin. Linjulestur er miðvís bóklig og praktisk fyrireiking til at undirvísa í einari av lærugreinum fólkaskúlans. Bachelor uppgáva verður eisini skrivað hetta árið.
Annar partur - fjórða árið - er yrkisrættað. Onnur linjan verður lisin, og tey lesandi fyrireika seg til lærarayrkið.
Starvslæran er týdningarmikil liður í útbúgvingwni.
Upptøkutreyt er prógv frá miðnámsskúla, ella annar skúli ella royndir.
Førleikakrøvini hjá hesum umsøkjarum verða mett í hvørjum føri sær.
Lestrarbyrjan er august 2011

Føroya Læraraskúli:

## Námsfrøði

Námsfrøðingaútbúgvingin tekur 4 ár og er í tveimum stigum.
Fyrri partur er 3 ára útbúgving á bachelorstøði. Dentur verður lagdur á, at tey lesandi fáa gott fakligt grundarlag í námsfrøði, t.d. at skilja grundleggjandi tættir í ástøðiligum arbeiðisháttum, læra virðini, námsfrøðingayrkið byggir á og nema sær ta námsfrøðiligu og sálarfrøðiligu vitan og teir førleikar, ein námsfrøðingur brúkar í gerandisdegnum.
Triðja árið savna tey lesandi seg um eitt ávíst námsfrøðiligt øki, og bachelor uppgáva verður skrivað. Annar partur - fjórða árið - er eitt yrkisrættað ár. Tey lesandi fyrireika seg til námsfrøðingayrki.
Starvslæran er týdningarmikil liður í útbúgvingini.
Upptøkutreyt er prógv frá miðnámsskúla, ella annar skúli ella royndir.
Førleikakrøvini hjá hesum umsøkjarum verða mett í hvørjum føri sær.
Lestrarbyrjan er august 2011

Søgu- og samfelagsdeildin:

## Søga

Á søgudeildini lesur tú fleiri ymsar lærugreinar, men dentur verður lagdur á søgu. Tvey tey fyrstu árini eru ymsar grundlærugreinar, og triðja árið ber til at leggja dent á tað, tær dámar best.
Til ber at lesa bæði bachelor og master í søgu. Lesturin er skipaður við tveimum árum av støðisnámi og einum bachelorári, og um tú ynskir at fara víðari, eru tvey ár av masterlestri.
Upptøkutreyt er miðnámsprógv ella samsvarandi útbúgving. 30 lesandi verða tikin inn árliga, og lestrarbyrjan er august 2011.

Søgu- og samfelagsdeildin:

## Samfelagsfrøði

Á søgu- og samfelagsdeildini ber til at lesa bachelor í samfelagsfrøði. Hetta er ein samantvinning av bæði søgu og stjórnmálafrøði. Samfelagsfrøði kann nýtast sum ein útbúgving fyri seg, men til ber eisini til at lesa víðari, og tá fara inn á eina meiri stjórnmálasliga kós.
Til ber at lesa bachelor í samfelagsfrøði, lesturin er skipaður við tveimum støðisárum og einum BA ári.
Upptøkutreyt er miðnámsprógv ella samsvarandi útbúgving.
Lestrarbyrjan er august 2011.

Søgu- og samfelagsdeildin:

## Stjórnmálafrøði

Á søgu- og samfelagsdeildini lesir tú fleiri ymsar lærugreinar, men dentur verður lagdur á stjórnmálafrøði.
Til ber at lesa bachelor í stjórnmálafrøði. Lesturin er skipaður við tveimum árum av støðisnámi og einum bachelorári.
Lestrarbyrjan er í august 2012
Upptøkutreyt er miðnámsprógv ella samsvarandi.



## Alment skeið í føroyskum

Til ber at taka eitt styttri próvskeið í føroyskum -og skeiðið er fyri øll. Skeiðið økir um førleikarnar í føroyskum bæði viðvíkjandi arbeiði, gerandislívi og hægri lestri. Dentur verður lagdur á mállæru, og nógvar praktiskar venjingar stýdja tað, sum gjøgnumgingið verður. Eisini verða ymsir tekstir tiknir fram, sum skulu lesast, greinast og tulkast. Undirvíst verður í 18 vikur og kostnaður er 2.800 kr + próvtøkugjald á 700 kr.
Skeiðsbyrjan er 26.09.11



## Gransking

Fróðskaparsetrið er ein granskingar og undirvísingarstovnur, sum tekur lut í bæði heimligari og útlendskari gransking. Granskarnir á Fróðskaparsetrinum samstarva við starvsfelagar á útlendskum universitetum um verkætlanir. Eisini er nógv samstarv millum teir føroysku granskingarstovnarnar. Herfyri varð ein føroyskur granskingarpolitikkur orðaður, sum skal tryggja føroyskum granskarum betri karmar og møguleikar.